# Christian Høgni fær sáttmála

**Komandi hálva árið skal runavíkingurin sannføra teir í Esbjerg um sítt virði**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Christian Høgni Jacobsen fer komandi árið at stríðast um eitt av álopsplássunum í Esbjerg*

Seinasta mánaðin ella so hevur runavíkingurin, Christian Høgni Jacobsen, verið í Esbjerg, har hann hevur royndarvant við nýggja superligufelagnum.

### Fær sáttmála

Hóast venjingarnar hava verið darvaðar av lærskaðanum, sum áleyparin hevur drigist við, so tykist hann kortini at hava sannført venjarin somikið nógv, at ein avtala liggur klára at skriva undir, tá hann hósdagin kemur aftur til Danmarkar.

- Vit hava eina munnliga avtalu, og ætlanin er so, at eg skal skriva undir, tá vit koma aftur til Danmarkar, segði Christian Høgni við Útvarpið mánakvøldið.

Í fyrsta umfarinum verður talan tó bert um ein sáttmála fram til ársskiftið, men gongst eftir vild, tykjast stór sannlíkindini vera fyri, at sáttmálin verður longdur til ta tíð.

- Teir vilja í fyrsta umfari royna, um eg megni at stríða meg til eitt pláss á superligaliðnum. Teir hava sagt mær, at teir vænta, at eg fari at klára hetta.

### Ikki fyrstu ferð

Hetta er annars ikki fyrsta ferðin, at útlendskur áhugi hevur verið fyri Christian Høgna Jacobsen. Fyri hálvum triðja ári síðani var áhugi úr einum portugisiskum felag. Christian Høgni tók tá ikki av tilboðnum, og tá hann stutt eftir breyt beinið, varð dreymurin um útlandið lagdur á hyllina eina tíð.

Síðani hann kom aftur á føroyska fótbóltspallin, hevur tað tó gingið við rúkandi ferð. Seinnu helvt av kappingarárinum í fjør var hann ein av høvuðsmonnunum hjá NSÍ, tá teir fleiri ferðir upp í slag bukaðu oddaliðini í landskappingini, og tað var eisini við buldur og brak, at hann í vár fyri fyrstu ferð royndi seg á A-landsliðnum.

Hetta var í Luksemburg, har hann avloysti ein skaddan Toda Jónsson, og í fyrsta veruliga landsdysti sínum skoraði Christian Høgni annað málið, meðan hann legði upp til hitt. Fýra dagar seinni spældi hann ein branddyst í Russlandi, tá Føroyar taptu tepurt, og ivaleyst eru tað fyrst og fremst hesi bæði avrikini, sum aftur hava kveikt áhugan hjá útlendskum feløgum.

Við Útvarpið segði Christian Høgni annars, at bæði Vejle og B93 eisini høvdu sýnt ánuga, men í fyrsta umfarinum verður tað so Esbjerg, sum fær gleðina av føroysku fótbóltsevnunum.

Christian Høgni Jacobsen verður sostatt sætti føroyski leikarin í donskum fótbólti í løtuni. Framman undan er talan um Toda Jónsson, Johan Byrial Hansen, Óla Johannesen, Øssur Hansen og Atla Gregersen.

# Løgin kensla

**Hjálparvenjarin á landsliðnum heldur tað kennast løgið, at somikið fá fjølmiðlafólk eru at fylgja landsliðnum í Jugoslavia**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Tað man vera sjáldan – um nakran tíð - at fjølmiðlafylgi aftan fyri føroyska landsliðið hevur verið so lítið, síðani Føroyar av fyrstan tíð tóku lut í altjóða kappingum.

Aloftast hevur talan verið um fólk frá Útvarpinum og teimum báðum stóru bløðunum, umframt at sjónvarpið og umboð fyri okkurt av hinum bløðunum eisini hava verið við á nøkrum av ferðunum.

### Fara at royna

Hesa ferð er tað tó bert Útvarpið, sum hevur fólk við á ferðini, og spurdur, um tað kendir øðrvísi, nú somikið fá fólk eru við, svaraðir hjálparvenjarin á landsliðnum, Jógvan Martin Olsen, at tað kendist eitt sindur løgið.

- Tað má í øllum førum vera langt síðani, at somikið fá fjølmiðlafólk hava verið við. Nú eru tað bara teir tríggir úr Útvarpinum, og tað kennist eitt sindur løgið, heldur venjarin fyri.

Hvussu er og ikki, so fara vit her á Sosialinum kortini at gera okkara besta, til tess at fylgja landsliðnum á ferðini. Fartelefonir eru hentar at hava í slíkum førum, og nú tað røkist fyri, at SvF eisini fer at senda frá dystinum, er tað so ikki á tekniska økinum, at forðingar liggja hesum viðvíkjandi.

## Beinleiðis í SvF

**Sjónvarpið fer helst at senda beinleiðis frá landsdystinum í Jugoslavia**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

- Vit hava í øllum førum fingið fatur á øllum rættindum til dystin, og allar avtalur annars eru eisini komnar upp á pláss, so tað fer allar helst at bera til hjá okkum at senda dystin beinleiðis.

Soleiðis sigur Øssur Winthereig, tíðindaleiðari í SvF, tá vit spyrja, um Sjónvarpið fer at senda beinleiðis, tá føroyska fótbóltslandsliðið skal takast við Jugoslavia mikukvøldið.

Seinastu forðingarnar hesum viðvíkjandi vóru av meira tekniskum slag, men tá vit frættu beint fyri døgurða týsdagin, hevði tað eydnast hjá tøkningunum at fáa sambandið í lagi, so varpanin av dystinum tykist nú vera púra vís.

SvF hevur tó ikki fólk á leikvøllinum í Beograd, men verða tað ístaðin frásøgufólk í

# Samanleggin á Sælandi

**Roknað verður við, at superligufelagið, Lyngby, og grannarnir úr Farum fara at leggja feløgini saman komandi summar**

DANMARK
*Jákup Mørk*

Tað var ein bumba av miðal stødd, sum varð slept í donsku miðlunum í gjár, tá Ekstra-Blaðið avdúkaði, at fótbóltsfeløgini úr Farum og Lyngby at kalla eru komin á mál við eini ætlaðari samanlegging.

Seinastu vikurnar hevur málið verið frammi í donsku miðlunum, og fótbóltsglaði borgarstjórin í Farum, Peter Brixtofte, hevur millum annað sagt, at hann helt tað vera upplagt við eini samanlegging millum Farum, AB og Lyngby.

### Bjarginarmaður

Fram til í gjár var tað tó eingin, sum roknaði við, at partarnir vóru komnir somikið langt ávegis, at ein samanlegging kann fremjast í nærmastu framtíð.

Tosað verður nú um, at nýggja felagið skal vera veruleiki, tá farið verður undir komandi kappingarár, og um so er, skal umsókn hesum viðvíkjandi sendast DBU í seinasta lagið á midnátt mikukvøldið.

Serstakliga hevur hetta vakt ans í fyrrverandi felagnum hjá Toda Jónsson, Lyngby, har hópur av viðhaldsfólkum hevur gjørt vart við misnøgd sína, men stjórin í felagnum, Jørn Terkelsen, tykist ikki at lata við seg koma.

Sami Terkelsen var annars bjargingarmaður hjá felagnum fyrr í ár, tá vandi annars var fyri, at felagið noyddist á húsagang. Har umframt verður roknað við, at umframt tann pening, sum Terkelsen tá keypti partabrøvini fyri, noyðist hann í egnan lumma eftir einum seks milliónum, til tess at tryggja framhaldandi fíggjarligt grundarlag undir felagnum.

### Dystir í Farum

Gerst samanleggingin veruleiki, fer nýggja felagið uttan iva at halda til í Farum, har kommunan fyri stuttum hevur latið gjørt eitt spildurnýtt Stadion. Venjarin verður eftir øllum at døma »besti venjarin í Danmark« Christian Andersen, meðan væl lýddi Lyngby-venjarin, Poul Hansen, helst má finna sær annað starv.

Harumframt fer hetta at viðføra í øllum førum byrjanina til eina miðsavnan av fótbóltinum á Norðursælandi, og spurningurin er so, um samanleggingin ikki fer at gerast meira umfatandi.

Á heimasíðuni hjá Lyngby hevur Jørn Terkelsen roynt at svara firtnu viðhaldsfólkunum hjá Lyngby, men hann hevur á ongan hátt roynt at avvísa hetta sum nakað veruleikafjart, og tí verður roknað við, at neyðuga umsókin fer at verða send DBU, áðrenn mikudagurin er farin, og verður talan soleiðis um triðju samanleggingina í donskum toppfótbólti. Hinar báðar eru FC København (B 1903 og KB) og FC Midtjylland (Herning og Ikast).



# Sjáldsamur stórsigur

**Tey flestu høvdu væntað ein javnan dyst millum íslendingar og føroyingar, men føroyingarnir vildu annað og avsmurdu grannatjóð okkara.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Íslandska úrvalsliðið - telvarar úr norður og eysturlandinum - kom til Føroyar fríggjadagin við tí vón at endurvinna steypið sum teir vunnu í 1999. Undan hesum 14. dysti landanna millum hava íslendingar vunnið 10 ferðir, meðan vit hava tríggir sigrar í skjáttuni. Okkara seinasti sigur varð vunnin í Klaksvík í 1993.

Føroyska liðið var petti sterkari, hvat rating viðvíkur, men at munurin bleiv so stórur hevði eingin væntað. Á fyrstu fimm borðunum var sera javnt í styrki, men í niðara endanum vóru føroyingarnir munandi sterkari.

Lagt varð til brots leygardagin í hølum Havnar Telvingarfelags, og leingi var javnt á at líta. Tá komið varð djúpt inn í fjórða tíman høvdu føroyingarnir tó lagt seg trygt á odda, og vunnu loksins fyrsta umfar 6,5 — 3,5. Eitt gott grundarlag undan øðrum og seinasta umfari, sum bleiv telvað sunnudagin.

### 1.umfar 6 1/2-3 1/2

| | |
|---|---|
| IM John Rødgaard — Jón G. Viðarson | 1/2-1/2 |
| Torbjørn Thomsen — Halldór G. Einarsson | 1/2-1/2 |
| Ólavur Simonsen — Ólafur Kristjanson | 1-0 |
| Rani Nolsøe — Tór Valtysson | 1/2-1/2 |
| Carl Eli. N. Samuelsen — Jón T. Tór | 1/2-1/2 |
| Terji Petersen — Viðar Jónsson | 0-1 |
| Martin Poulsen — Ari Friðfinsson | 1-0 |
| Martin Brekká — Smári Ólafsson | 1-0 |
| Olaf Berg — Sigurdur Eirksson | 1-0 |
| Hans K. Simonsen — Eymundur Eymundsson | 1/2-1/2 |

### 2.umfar 8-2

| | |
|---|---|
| IM John Rødgaard — Jón G. Viðarson | 1/2-1/2 |
| Torbjørn Thomsen — Halldór G. Einarsson | 0-1 |
| Ólavur Simonsen — Ólafur Kristjanson | 1-0 |
| Rani Nolsøe — Tór Valtysson | 1-0 |
| Carl Eli. N. Samuelsen — Jón T. Tór | 1-0 |
| Torkil Nielsen — Viðar Jónsson | 1-0 |
| Martin Poulsen — Ari Friðfinsson | 1-0 |
| Martin Brekká — Smári Ólafsson | 1-0 |
| Olaf Berg — Sigurdur Eirksson | 1/2-1/2 |
| Hans K. Simonsen — Eymundur Eymundsson | 1-0 |

### Ótrúligt úrslit

Ein útskifting bleiv framd á føroyska liðnum sunnudagin, tá Torkil Nielsen røkti sætta borð ístaðin fyri Terja Petersen. Hesa uppgávu røkti Torkil avbera væl, eins og nærum allir gjørdu hendan sigursdag. Fýra stig í øðrum umfari hevði verið nóg mikið at vunnið samanlagt, men føroyingarnir gjørdu ikki mætari enn at vinna heili 8-2. Sostatt ein flottur 14,5 — 5,5 stórsigur til okkara menn.

Teir sum vunnu bæði talvini vóru Ólavur Simonsen, Martin Poulsen og Martin Brekká. Tvey talv verða í hósdagsblaðnum.

Íslendingarnir tóku stórtapið við einum smíli, men lovaðu tó at betra støðuna til næstu ferð. Teir fingu møguleikan longu sama kvøld tá snarlandsdystur bleiv leiktur, har allir møttu hvørjum øðrum. Ikki burdi teir bjóða av, tí hetta bleiv ein enn dyggari smeitur. Úrslitið gjørdist heili 61-39 til Føroyar, og tá væntaðu eisini John Rødgaard, Torbjørn Thomsen og Torkil Nielsen á liðnum.

### Hittast aftur um tvey ár

Undan snardystinum varð samkoma á parnassinum á Hotel Hafnia har borðeitt varð við besta slagi, og røður vórðu hildnar. Íslendingarnir fóru av landinum mikudagin.

Um tvey ár verður landsdysturin leiktur í Íslandi, helst í Akureyri, og tá er ætlanin at hava eitt minst so sterkt føroyskt lið sum hesuferð, og sjálvandi verður gjørt alt fyri at endurvinna steypin aftur.

Stuðlar til landsdystin vóru Formula Føroyar og Tórshavnar Skipasmiðja.

# Enn einaferð nær

Meðan landsdystur hevur verið leiktur her heima, hevur John Arni Nilssen roynt seg í NM, sum bleiv hildið í Bergen. Hann hevði enn eina góða kapping við úrslitum sum bíta seg fast í minni. Eitt nú javnleikirnir ímóti GM Einar Gausel og GM Thróstur Thórhallson vórðu væl leiktir. John Arni hevði undan seinasta umfarinum møguleika at ogna sær ein IM-norm, men bert um hann møtti einum +2450 telvara og samstundis vinna.



*John Arni Nielsen stóð seg væl í NM-kapingini, og var nær við at ogna sær fyrsta IM-normin*

Tíverri hevði seinasti mótstøðumaður hansara 2280, og helst var eingin luft eftir hjá John Arna, tí hann tapti heldur lættliga hetta talvið. Fimm stig av níggju møguligum, og ovarlaga á stigartalvuni er tó flott. Norðurlandameistari bleiv GM Evgenij Agrest úr Svøriki.

**-CENS**


## Leiðari

Rúsdrekkasøla Landsins søkir við hesum eftir leiðara til handilin í Havn.

**Um starvið**
Leiðarin hevur dagliga ábyrgd av handlinum, at hesin verður rikin sambært innanhýsis mannagongdum og sambært lógum og reglugerðum fyri Rúsdrekkasølu Landsins. Leiðarin er bindiliðið millum handilin og høvuðsumsitingina.

Starvið krevur góð evni at samstarva og samskifta og er í nógvar mátar krevjandi, men samstundis mennandi fyri rætta persónin.

**Um persónin**
Vit ynskja ein persón, ið er sjálvstøðugur, álítandi og hevur góð samstarvsevni. Eisini vænta vit, at tú hevur hug og evni til at seta teg inn í nýggj viðurskifti, bæði tá tað snýr seg um vørur og rakstur av einum handli sum hesum.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
- Leggja til rættis og samskipa arbeiðið í handlinum
- Bíleggja vøru
- Ymiskt eftirlit og avstemmingar
- Starvsfólkamenning

**Førleikakrøv**
- Handilsútbúgving saman við HH, studentsprógv ella aðrari miðnámsútbúgving
- Leiðsluroyndir, tað veri seg frá størri handli ella øðrum líknandi, er ein fyrimunur.
- Góðan kunnleika til EDV
- Góðan rokiskap

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Umsóknarfreistin er 27. august 2001.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Rúsdrekkasøla Landsins**
**Hoyviksvegur 51**
**Postsmoga 3069**
**Tórshavn**

Att.: Dagmar S. Joensen

Rúsdrekkasøla Landsins
Hoyviksvegur 51 Postboks 3069 FO-110 Tórshavn
Tel (+298) 31 42 77 Fax (+298) 31 22 60